og sum heild eini rúgvu av konventiónum, ið skulu haldast. Tað kann vera fínt, men eg haldi eisini tað kann vera ein stoppiklossur, sum kann halda fólki burturi, sum annars kundu fingið okkurt burturúr tónleikinum. Tey fimm stykkini í mínari konsert kunnu spælast hvørt fyri seg og summi teirra eru eisini framførd sum sjálvstøðug verk. Grundleggjandi hugskotið snýr seg um tað, at kunna hugsa um tvey ting í senn.

*KP: Tað er sum við hasum figurinum hjá danska sálarfrøðinginum Edgar Rubin, sum antin vísir ein vasa í miðjuni ella tvey andlitsumhvarvi, ið forma vasan. Tað er ógjørligt at uppfata bæði myndevnini í senn.*

TB: Ja, men tankin fascinerar meg. Eri eisini sera áhugaður í gomlum stereogrammum, har tú við at stara og skeita brádliga sært tann trýdimensionella formin, sum er goymdur í myndini. Tað snýr seg jú í stóran mun um perceptión. Tað er ymiskt hvussu vit eru fyri og tað er kanska ikki altíð vit megna at uppliva júst klikkið og tá er tað umráðandi, at fólk allíkavæl fáa nakað burturúr mínari konsert. Hetta er ein grund til, at eg havi broytt tann fyrsta partin av konsertini. Eg havi hugsað um hetta sama hugskotið áður, og eg havi gjørt royndir við tí, men tað er ikki eydnast mær at gjøgnumføra tað ordiliga fyrr enn nú. Heitið á verkinum Bábel sipar til, at verkini eru sera ymisk og tala hvørt við sínari tungu. Til dømis verða eitt rímiliga straight contemperary verk og ein wienerklassisk strúkikvartett, sum jú heilt týðiliga eru tvey sera ymisk tónleikamál, sett upp móti hvørjum øðrum.

## Crossover verkætlanir

*KP: Tú hevur eisini arbeitt við sonevndum crossover verkætlanum, har fleiri listagreinir samstarva við tónleiki, dansi, performance, t.d. tað absurda verkið »Investigations of a Dog«*

TP: Ja, Rannvá Káradóttir, Marianna Mørkøre, Andras Olsen og eg gjørdu »Investigations of a Dog« (2007), sum var ein audiovisuel konsert fyri messingblásara, dansarar og video, ið er grundað á eina stuttsøgu eftir Franz Kafka. Men so er tað eisini verkið »Barbara«, sum seinni í ár verður framført í Norðurlandahúsinum í Havn, í Mentanarhúsinum í Runavík, í Íslandi og í Danmark.

- Hetta er eitt verk, sum er bílagt av einum donskum dansihópi, sum eitur Saga Dance Company, og sum verður eitt samstarv millum dansararnar og kórið Mpiri. Nakað av tí mest áhugaverda við hesum verki haldi eg vera dentin, ið verður lagdur á improvisatión. Hetta verður ikki nøkur opera ella eitt



*»We are sailing« hjá Tóroddi Poulsen. Skemtiliga og poetiska huglagið í myndum Tórodd Poulsens gongur aftur í summum verkum hjá Tróndi Bogasyni.*

sum soleiðis dramatiserað verk av skaldsøguni hjá Jørgen Frantz-Jacobsen, men nógv meira einfalt og stiliserað. Vit ætla at royna at fáa tað klaustrofobiska í einum oyggjasamfelag fram, á hendan hátt verður evnið eitt sindur meira alment og nýtist ikki bara at snúgva seg um Føroyar. Verkið verður myndað av upplestri, elektronikki, percussion og kingosálmum, har eg havi tikið støði í lýsingunum hjá einum antropologi, sum var í Føroyum fyri langari tíð síðani og sum helt, at føroyingar sungu so ljótt: "..hver fugl synger med hver sit næb". Her havi eg gjørt ymsar melodiir, sum liggja og snúra rundanum lagið í kingosálminum, og tað haldi eg riggar nokkso væl. Improvisatiónin er sentral í hesum verkinum, sum kann variera frá at vara ein hálvan til fimm tímar. Eg haldi improvisatión vera grundleggjandi áhugaverda, samstundis sum hon er ógvuliga vandamikil. Sjálvt um tað skal eitast at leggja upp til púra fríar tónar, ið verða uppfunnir í løtuni, so vísir tað seg ofta, at fólk gera tað, sum er behagiligt fyri tey, og tað vil siga tað sama sum tað, sum tey eru von at gera. Fyri meg er tað tí umráðandi, at improvisatiónirnar verða stýrdar.

## Tóroddur og Tarira

Verkini hjá Tróndi Bogasyni eru umframt, at tey sjálvandi eru sera ymisk, fleirtýdd og artistisk og ofta eisini sera humoristisk, t.d. kórverkið "Møsnúlin" við teksti eftir Tórodd Poulsen. Tóroddur er eisini á skránni í nærmastu framtíð, tá Tróndur fer at taka upp yrkjaran, meðan hann lesur upp egnar tekstir. Upptøkurnar skal hann brúka í onkrari av teimum mongu verkætlanunum, sum eru í stoypiskeiðini.

Tróndur er yvirhøvur sera áhugaður í yrkingum, og upprunaliga hugskotið til at gera hesa samrøðu kom av lyriska og minimalistiska verkinum »Nocturne 1«, sum Tróndur hevur skrivað eftir bílegging frá kórinum Tarira, sum veruliga er eitt einastandandi verk, ikki minst orsakað av mátanum, sum kompositiónin fullkomiliga samsvarar teirri løgnu, brotakendu yrkingini, har ein kvinnulýsing og ein landslagslýsing tykjast eitt sindur tilvildarliga samansettar. - Men tað er júst tann at síggja til óstortsliga samansetingin, sum ger, at yrkingin skapar sín egna alternativa veruleika í staðin fyri bert at herma eftir teimum verandi veruleikunum, sum t.d. í eini landslagsyrking við kvinnumetaforum ella eini kvinnulýsing við landslagsmetaforum. Á onkran hátt er tað eins og tín kompositión á sama hátt skapar ein triðja veruleika?

TB: Ja, eg gjørdist rættiliga hugtikin av hasi yrkingini hjá Róa Paturssyni. Fyrst helt eg hana vera stuttliga við løgnu orðasamansetingunum, men so las eg hana betri og uppdagaði tað fantastiska, sum hendir, at summi orð gerast ótrúliga sterk í hesu nýggju samansetingini, og hetta havi eg roynt at fingið fram í kompositiónini.

## Føroyskt tónaskald við viðburði

*KP: Tvær DVD-fløgur eru á veg út, har tú hevur gjørt útsetingarnar hjá ávikavist Teitur og Choir of Young Believers, sum spæla saman við DR Underholdningsorkesteret. Greið frá samstarvinum og framtíðar ætlanum. Eru bíleggingar strævnar, tí tær eru bundnar?*

TB: Samstarvið við DR Uderholdningsorkesteret er komið í lag orsakað av samstarvinum við Teitur. Tað hevur verið ómetaliga áhugavert, og fólkini hava sýnt mær stórt álit á tann hátt, at tey hava verið við uppá tey allarvillastu av mínum hugskotum. Eg eri bookaður til einaferð í mars næsta ár til at gera ógvuliga ymisk ting. Eg havi bíleggingar úr Noregi, Danmark, Svøríki og møguliga eina her úr Føroyum. Bíleggingarnar eru í grundini lutfalsliga opnar, men eg má sjálvandi taka atlit til bólkin, ið bíleggur og hvat slag av instrumentum myndar viðkomandi bólk. Men eftirhondini eru næstan øll við uppá at brúka elektronikk, sum gevur nakrar klangligar møguleikar, sum mær dámar.

*KP: Samanblandið av stílum í Bábel kundu týtt uppá, at tú ert postmodernist?*

TB: Altso tað veit eg ikki. Hatta haldi eg í grundini er fyri komandi tónleikasøgufrøðingar at finna út av. Sjálvandi skal eg vera tilvitaður og umhugsa míni hugskot osfr., men eg eri ikki tann, sum skal plasera mín tónleik.

*KP: Men umframt Sunleif Rasmussen ert tú einasta tónaskald í Føroyum, sum hevur formliga útbúgving í komposition frá konservatoriinum. Sært tú teg sjálvan sum eitt føroyskt tónaskald*

TB: Tað er ein góður spurningur. Føroyska hevdin við kontemporerum tónleiki er jú rættiliga ung og fáment. Tað var William Heinesen, sum byrjaði einaferð í 1950´unum, og so skulu vit heilt fram til sjeytiárini, áðrenn Pauli í Sandagerði og síðani Bjarni Restorff osfr. fara í gongd. Eg haldi, at danska tónaskaldið Vagn Holmboe hevur havt stóran týdning fyri føroyskt tónasmíð og fyri sjálva uppfatanina av tónleiki í Føroyum heilt fram til í dag við verkunum, sum hann hevur gjørt, og sum Ólavur Hátún hevur fingist við.

- Men fyri at koma aftur til spurningin, so eri eg sjálvandi bæði tónaskald og føroyingur. Tónleikurin hjá mær er ávirkaður av øllum tí, eg havi upplivað, og eftirsum eg eri vaksin upp her, hava Føroyar stóran týdning. Eg haldi eisini, at nærleikin við náttúruna hevur eina serliga ávirkan. Men tað hevur MTV so sanniliga eisini, og tað hevur fyllt minst líka nógv sum Ólavsøkusangurin. Har er okkurt við Waagstein, sum hoyrist aftur í nógvum føroyskum tónleiki, okkurt melankolskt kanska. Men deyðin kennist øgiliga tætt í Føroyum. Eg hugsaði um tað í dag, tá eg sat í flogfarinum og las avísina. Har var ein krossur á síðuni, eg las ikki minningarorðið, men eg hugsaði: ja, nú eri eg á veg til Føroya aftur.

## Floytulát ella fuglatrilla

Vit práta nokkso leingi aftur og fram um føroyskan tónleik. Eg greiði frá, at eg minnist fyri 20-25 árum síðani, hvussu øðrvísi sangurin hjá Sunleif Rasmussen "Sig mær hví er foldin føgur" ljóðaði og sangirnir hjá Paula í Sandagerði, sum eisini vórðu mettir at vera ógvuliga modernaðir. Tað er merkiligt, at hesir vakru sangir tá megnaðu at provokera sjálvt tey hampiligastu kórfólkini. Tað er næstan ómøguligt at ímynda sær hetta í dag, men vísir, at ein menning hóast alt er farin fram í føroysku tónleikafatanini. Eg nevni, at eg haldi meg hoyra stóran mun á tónleikinum hjá Sunleif og Tróndi.

TB: Beint í løtuni arbeiði eg nógv við ávísum skipanum, m.a. við einum skalasystemi, sum er ein ógvuliga fleksibul skipan, ið eg brúki í staðin fyri tonalitet og so eisini rútmiskar skipanir. Sunleif arbeiðir á sama hátt, bara við nøkrum øðrum skipanum.

*KP: Jú men í hansara tónleiki hómi eg elasmáar glottar av føroysku náttúruni, og tað geri ikki í tínum verkum.*

TB: Tað ørkymlaði meg eisini nokkso nógv á konservatoriinum, tá fólk partú skulu assosiera eina floytu, ein floytutóna ella eina floytutrillu við fuglalát. Eg royndi at greiða teimum frá, at ein floyta í mínum tónleiki í grundini bara er ein floyta, that´s it! Men sjálvandi, fólk mugu assosiera, sum tey vilja.

Og nú er seint og lotið kalt, og sjálvt um omanfyristandandi setningur við floytutrilluni neyvan var tað seinasta, sum varð sagt hetta kvøldið, so riggar hann sum yvirskrift og avrundan av hesi samrøðu við týdningarmikla samtíðarlistamannin Trónd Bogason.

*Tað er kanska ikki altíð, vit megna at uppliva júst klikkið, og tá er tað umráðandi, at fólk allíkavæl fáa nakað burturúr mínari konsert*

*Deyðin kennist øgiliga tætt í Føroyum*

Á Summartónum í kvøld klokkan 20 fer Aldubáran at framføra debutkonsertina hjá Tróndi Bogason í Listaskálanum